# Vinnan fær sítt egna blað

**Í gjár kom blaðið »Vinnuvitan« fyri fyrstu ferð á gøtuna. Blaðið, sum fyrst og fremst fæst við vinnutíðindi, skal koma út aðruhvørja viku, og blaðið ætlar sær bæði at kveikja og kanna**




*Vinnulívið fær nú eitt nýtt forum í føroyska fjølmiðlaheiminum. Nýggja blaðið »Vinnuvitan« fer at seta sjóneykuna á føroyskt vinnulív, og blaðið ætlar sær bæði at kanna og greiða frá verandi vinnum og at skunda undir nýggjar vinnur*

BLAÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Maður kemur í mans stað, verður sagt, og kanska er tað eisini galdandi fyri bløðini.

Fregnir góvust við sínari útgávu fyrr í ár, og nú bjóðar eitt nýtt blað seg fram at fylla tómrúmið. Blaðið er eitt vinnublað fyrst og fremst, og tað hoyrist aftur í navninum á blaðnum – »Vinnuvitan«.

Blaðið skal koma út aðruhvørja viku at byrja við, og tað fer at kosta 20 krónur í leysasølu. Blaðið var fyrstu ferð prentað í 3000 eintøkum, og ætlanin er, at blaðið við tíðini skal koma út hvørja viku.

Óli á Deild Olsen, sum er stjóri fyri kt-fyritøkuna Kervi, er blaðstjóri á nýggja blaðnum, og hann er eisini ein stigtakari til útgávuna.

– Hetta hugskotið er trý ára gamalt, og nú er tað veruleiki. Vit hava hildið, at føroyskt vinnulív hevur manglað eitt forum. Eg veit, at aðrir miðlar gera eitt sindur við vinnutilfar, men nú fær vinnan eitt blað burturav, sigur Óli á Deild Olsen.

### Roynd blaðfólk

Eingi blaðfólk verða í føstum starvi á »Vinnuvitan«, men fleiri freelance-journalistar skulu skriva til blaðið. Hetta verður mett sum besta loysnin fyri blaðið.

Millum teir eru fleiri royndir journalistar, og eisini journalistar, sum áður skrivaðu fyri Fregnir. Sveinur Tróndarsson, Høgni Mohr, Hilmar Jan Hansen, Malan Johansen og Niels Juel Arge eru millum fólkini, sum skulu fylla teigarnar í nýggja vinnublaðnum. Samanlagt verða eini 10 fólk knýtt at blaðnum.

Tað verður ReproZ, sum skal seta blaðið út og leggja uppsetingina til rættis, og blaðið verður sum hini føroysku bløðini prentað á Prentmiðstøðini í Havn.

### Bakgrund heldur enn tíðindi

»Vinnuvitan« ætlar sær at leggja dent á bakgrundstilfar heldur enn tíðindatilfar. Tað ræður um at fara meira í dýpdina við vinnutilfarinum, heldur enn bara at bera skjót og stutt tíðindi.

– Vit hava ongar ætlanir, at vera fyrst við tí síðsta, men vit fara heldur eitt sindur í dýbdina við okkara tilfarið. Bakgrund hevur týdningarmikil fyri okkara blað, sigur Óli á Deild Olsen.

Hann heldur, at nýggja blaðið verður eitt alternativ til verandi bløðini í Føroyum. Tey ætla sær ikki at kappast um vanliga tíðindatilfarið, men heldur um at leggja nakað afturat.

– Øll londini rundan um okkum hava eitt vinnublað burturav, og tað hava føroyingar eisini brúk fyri. Vit fara at fáa ein virðisbrævamarknað í Føroyum, og tá verður eisini neyðugt við størri gjøgnumskygni, so fólk vita meira um fyritøkurnar.

### Kveikja og kanna

»Vinnuvitan« ætlar at sær at kveikja og kanna, sum tað verður tikið til á blaðnum.

Vit hesum hugsar blaðið sær, at tað fer at máta hitan í ymsum vinnun, greiða frá ráki, og eisini tora at leggja upp til, at nýggj átøk verða gjørd.

– Føroyingar hava eitt ov einstáttað vinnulív, og vit hava brúk fyri fleiri beinum at standa á. Tað tykist, sum vit bara góðtaka, at tá ið fiskaprísirnir eru góðir, so hava vit tað gott, og tá ið fiskaprísirnir eru lágir, so hava vit tað minni gott. Soleiðis nýtist tað ikki at vera, men vit mugu fáa nýggjar vinnur fyri at mótviga teimum stóru sveiggjunum í fiskivinnuni, heldur Óli á Deild Olsen.

»Vinnutíðindi« vónar tí, at blaðið – umframt at greiða frá verandi vinnum – eisini kann skunda undir nýggjar vinnur.

– Fiskivinnnan fyllir nógv í føroyskari vinnu, og sjálvandi fer blaðið eisini at viðgera fiskivinnuna, men vit ætla eisini at viðgera aðrar vinnur í blaðnum.

Fyrsta »Vinnuvitan« fæst nú til keyps kring landið og verður aftur á gøtuni síðst í aðru viku.

## Eygnamørk

BÓKAÚTGÁVA
*Jákup Mørk*




Mentunargrunnur Studentafelagsins hevur givið út nýtt yrkingarsavn við yrkingum eftir Tóroddi Poulsen.

Savnið ber heitið, Eygnamørk, og verða lív og deyði í hesum lýst hvørt um annað á speiskligan hátt verður sagt í tíðindaskrivi.

Hartil er nýggi skapningurin ein høvuðstráður í yrkingarsavninum. Sagt verður frá, nýføðinginum, tá hesin liggur í vøgguni, og síðani verða broytingarnar í lívinum lýstar, so hvørt sum hesar troka seg framat. Talan er í nógvum førum um sterkar kenslur, sum verða lýstar, og í tíðindaskrivinum verður eisini víst til rámandi orðini frá Leonard Cohen »Tú veitst ikki, hvat ótti er, fyrr enn tú ert blivin pápi«.

Umframt hetta speisemi eru trý ørini úr Jobsbók sett fremst, og geva hesi líkasum savninum ein ávísan karm og eitt ávíst álvarsemi.

Bókin er løgd til rættis og prentað hjá Føroayprent. Tórodd Poulsen hevur sjálvur gjørt permuna.

# Allir sangir hava rætt til lív

**Føroyski tónleikarin í Danmark, Terji Messell, hevur nú givið nýggja fløgu út á internetinum. Hann heldur, at sangir eru sum børn, og allir sangir hava rætt til lív**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Hann kallar nýggju útgávuna hjá sær fyri eina virtuella útgávu, og hon fæst bara umvegis heimasíðuna hjá honum.

Føroyski Terji Messell, sum nógvu seinnu árini hevur búð í Danmark, gongur sínar egnu leiðir við tónleikinum hjá sær. Hann hevur ongantíð verið bangin fyri at royna nakað nýtt, og nú hann er til reiðar við einari nýggjari útgávu, brúkar hann internetið til at fáa tónleikin út.

Hetta gera hann við at selja tónleikin hjá sær umvegis heimasíðuna hjá sær. Tað ber til at gjalda fyri tónleikin har, og síðani taka sangirnar niður á telduna ella mp3-spælaran.

Útgávan kallast »Songs by Messel Vol. 1«, og á henni eru 9 mp3-sangir.

### Sangir hava rætt til lív

Terji Messell var føddur í Havn, men hann hevur búð í Danmark í nógv ár. Hann spælir tónleik og undirvísir eisini í tónleiki.

Hann skrivar sínar egnu sangir, spælir teir live og gevur tónleikin út.

– Eg skifti ofta hugsan, men tað havi eg rætt til. So tú veitst ongantíð, hvat eg kann finna uppá at gera av tónleiki, um tað er poppur, rockur, jungle, jazz ella klassiskur tónleikur, sigur Messell á heimasíðu sínari.

– Ein sangur er fyrst og fremst eitt úttrykk, og sum eitt barn hava allir sangir rætt til lív, eisini um teir eru vanskaptir ella brekaðir. Eg eri pápi at 200 sangum, summir eru blivnir vaksnir og eru farnir heimanífrá, aðrir eru bara nýføðingar og hava brúk fyri nógum kærleika og umsorgan, og summir eru lætnir til uppaling, sigur Messell, sum er búsitandi í býnum Nibe.

Tað ber til at keypa nýggju útgávuna hjá Messell á heimasíðuni www.songsbymessell.com.